


Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 36 00 00, Faks 36 00 01, meginskrivstovan@naerverk.fo

# Leiðari til Trivnaðartænastuna

## Hevur tú yvirlit, innlit og innliving?

Tú hevur visjónirnar og evnini at leiða. Tú torir at hugsa nýtt og dugir at samstarva tætt við stovnarnar, sum hoyra undir Trivnaðartænastuna. Korini hjá menningartarnaðum hava tín serliga áhuga, og tú brennur fyri at geva teimum bestu karmarnar.

Trivnaðartænastan hjá Nærverkinum er ein sera týðandi stovnur, sum hevur ábyrgdina av tilboðum til fólk við serligum tørvi. Tað vil siga bústaðarviðurskifti umframt tilboð um virkni og umlætting. Virksemið er kring alt landið.

Trivnaðartænastan umsitur 86 milliónir krónur árliga og fevnir um 21 stovnar og 223 starvsfólk. Tú skalt tí hava evnir til dagliga at samskipa og samstarva við allar hesar stovnar. Tú verður partur av leiðslubólkinum í Nærverkinum, har tú kemur at arbeiða saman við leiðarunum á hinum deildunum í Nærverkinum.

Trivnaðartænastan skal áhaldandi mennast, og tú mást tí hava hegni og evni at hugsa nýtt, finna loysnir og fremja tær í verki. Tú skalt vera savnandi, duga at skapa sambond og eisini at varðveita tey.

Nærverkið er eitt fjølbroytt arbeiðspláss, har eingin dagur er eins. Økið hevur sera stóran almennan áhuga, og tað er ein avbjóðing at liva upp til tørvin hjá brúkarunum og teirra avvarðandi og krøvini frá politisku skipanini. Tú fært stóra ávirkan og kemur dagliga í samband við spennandi fólk, sum brenna fyri sínum yrki. Møguleikarnir fyri eftirútbúgving eru góðir.

**Vit vænta:**

- at tú hevur viðkomandi víðari útbúgving og møguliga eftirútbúgving
- at tú hevur hollar leiðslu- og starvsroyndir
- at tú kennir til almenna fyrisiting.

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Leiðarin fyri Trivnaðartænastuna hevur beinleiðis tilvísing til stjóran í Nærverkinum.

Upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Nærverkið á telefon 360000 og tosa við Mary J. í Garði, stjóra.

Starvið verður sett sum skjótast.
Send eina umsókn við avriti av prógvum og viðmælum til:

**Nærverkið**
Argjavegur 26, Argir
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
Stílað: **Mary J. í Garði , stjóri**

**Umsóknarfreist: Týsdagin 11. mars 2008.**

Lesið meira á www.naerverk.fo

**www.naerverk.fo**

# KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS



## *Frítíðaravloysarar*

**Deild A kirurgisk songjardeild og Deild M medisinsk songjardeild**
Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsuatstøðingar /sjúkrahjálparar.
Søkt verður eftir frítíðaravloysarum á songjardeildunum A og M í tíðarskeiðnum 1. juni til 31. august 2008.

**Anæstesideildin**
Søkt verður eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing til anæstesideildina.
Frá 1. juni til 31. august ella eftir nærri avtalu.

**Skurðgongin**
Søkt verður eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing á skurðgongini frá 1. juni til 31. august ella eftir nærri avtalu.
Neyðugt er við kunnleika og royndum innan økið.

**Nærri fæst at vita um størvini frá:**
Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu
tlf. 454545 lokal 106
teldupost: fyristodukvinna@ks.fo / www.ks.fo

Lønar- og setunnartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn saman við prógvi og autorisatión verður sent til:
Klaksvíkar Sjúkrahús
att. umsjónarmaðurin, FO-700 Klaksvík

Umsóknarfreist 23. mars 07